# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Menningarlæran hjá Darwin er áhugaverd, men eg haldi ikki, at hon greiðir lívsins loyndarmál*

*George W. Bush*

# Sótu 17 tímar á ísinum

**Danski rækjutrolarin Atlantic Enterprise bjargaði tveimum monnum, sum noyddust at neyðlenda á ísinum við Baffin Island**



*Atlantic Enterprise hoyrir heima í Nexø á Bornholm*

*Mynd: Polfoto*

Teir báðir menninir vóru á veg av meginlandinum til oynna Baffin Island, tá tað lítla Cessna-flogfarið fekk trupulleikar við motorinum. Flogfarið var tá nakað sunnan fyri Baffin Island í Eysturkanada, og tað eydnaðist monnunum at seta tað á ein stóran ísflaka.

Kanadiska bjargingartænastan fór alt fyri eitt at leita eftir teimum báðum monnunum, men tá einki var at síggja til teirra, kunngjørdi svenska uttanríkisráðið fyrrapartin í gjár, at báðir menninir vóru deyðir.

Men seinnapartin í gjár fekk eitt flogfar hjá kanadisku bjargingartænastuni eygað á menninar niðri á ísinum. Næsta skip var danski rækjutrolarin Atlantic Enterprise, og tað eydnaðist honum at taka teir báðar menninar av ísinum. Tá høvdu menninir verið á ísinum í 17 tímar.

Ein tyrla kom seinmni eftir monnunum og flutti teir á sjúkrahús. Danin er miðskeiðis í tjúgunum, og sviin er í fimmtiárunum.

-Teir vóru sera hepnir at sleppa livandi frá hesum, og teir grótu av gleði, tá vit komu til teirra, sigur skiparin á Atlantic Enterprise, Bo Mortensen við fjølmiðlarnar. Hann sigur, at menninir høvdu tað gott eftir umstøðunum, men at teir høvdu frostsár á beinunum.



*Caroline Kennedy er dóttir John F. Kennedy, fyrrverandi forseta*

*Mynd: AP*

# Enn ein Kennedy á veg í Senatið

Nógv bendir á, at Caroline Kennedy fer at taka við sætinum hjá Hillary Clinton í Senatinum

Tá Hillary Clinton verðuruttanríkisráðharri, noyðist hon at siga sætið í Senatinum frá sær. Hillary er vald í New York, og sambært borgarstjóranum har, Michael Bloomberg, er lítið at ivast í, at tað verður Caroline Kennedy, sum skal loysa Hillary Clinton av sum senatorur.

Michael Bloomberg segði í gjár, at Caroline Kennedy hevur drúgvar royndir, og at „allir vegir liggja opnir fyri henni", sum hann tók til.

Caroline Kennedy er útbúgvin løgfrøðingur og hevur eisini roynt seg sum rithøvundur.

# Búskaparliga afturgongdin í USA fer at halda fram

Barrack Obama væntar, at støðan í amerikanska búskapinum verður verri enn, áðrenn vend kemur í

- Okkara búskaparstøða fer at versna, so hon verður verri enn, áðrenn tað aftur fer at ganga tann rætta vegin, segði komandi amerikanski forsetin, Barrack Obama, í samrøðu við sjónvarpið NBC gjáranáttina.

Leygardagin segði haqnn, at stjórn hansara fer at gera risastórar íløgur samferðslukervið. Talan er um ta størstu íløguna síðani 1950-árini, tá amerikanska motorvegakervið bleiv bygt, og verkætlanin fer at geva fleiri milliónir arbeiðspláss.

Hinvegin vildi hann ikki siga, hvussu nógvar pengar verkætlanin fer at kosta, og hann vildi heldur ikki geva nakað boð uppá, hvussu stóra hjálp teir illa trongdu húsaeigararnir fáa. Haraftuírmóti lovaði hann at taka tað neyðuga stigið fyri at hjálpa húsaeigarunum, um núverandi stjórnin ikki ger tað, áðrenn hon fer frá.




*Barrack Obama í sjónvarpssendingini „Meet the Press"*

*Mynd: NBC*

- Vit fara at geva sjúklinginum blóð, so viðurskiftini gerast meiri støðug. Tað ber í sær, at vit noyðast at góðtaka hall í landshúsarhaldinum eina tíð, tí tað avgerandi er, at hjálpartiltøkini fáa ferð aftur á búskapin, segði Obama við NBC. Hann nam við støðuna hjá teimum stóru bilverksmiðjunum og segði, at tær eiga at fáa hjálp, men samstundis hartaði hann leiðslurnar á verksmiðjunum fyri at hava sitið hendur í favn alt ov leingi.

**STUTT SAGT**

## Kinesisk foreldur fáa ikki endurgjald

Ein dómstólur í Kina noktaði í gjár at viðgera eitt mál, har foreldur krevja endurgjald, tí teirra børn gjørdist sjúk ev eitraðum mjólkarpulvuri fyrr í ár. Foreldrini kravdu at fáa 14 milliónir kinesiskar juarar ella umleið 12 milliónir krónur í endurgjaldi frá einum almennum, sum hevði gjørt pulvurmjólkina.

Hildið verður, at umleið 300.000 kinesisk pinkubørn gjørdust sjúk av tí eitraða mjólkarpulvurinum, og sambært myndugleikunum doyðu seks børn. Kanningar staðfestu, at evnið melamin var í pulvurinum.

Tann almenna grundgevingin hjá dómstólinum fyri at vísa endurgjaldskravinum burtur var, at myndugleikarnir arbeiða við málinum. Men sakførararnir hjá foreldrunum halda, at hetta er bara eitt skálkaskjól fyri at sleppa undan einari gølu afturat um ta eitraðu mjólkina.

## Nýggj valsamgonga í Svøríki

Í Svøríki hava sosialdemokratarnir skipað valsamgongu saman við umhvørvisflokkinum og vinstraflokkinum. Ætlanin er so, at teir tríggir flokkarnir skulu í felag bjóða teirri borgarligu stjórnarsamgonguni av, tá næsta ríkisdagsvalið verður í 2010.

Sosialdemokratarnir, sum hava sitið við valdið í Svøríki í 65 av teimum seinastu 76 árunum, hava ongantíð skipað valsamgongu fyrr. Men avgerðin nú er helst ein avleiðing av valúrslitinum fyri tveimum árum síðani, tá sosialdemokratiskir flokkurin fekk 35,3 prosent av atkvøðunum, sum var floksins ringasta úrslit í mong ár.

Sosialdemokratiski floksformaðurin, Mona Sahlin, segði við svenska ríkisútvarpið í gjár, at teir tríggir flokkarnir, sum nú hava skipað valsamgongu, eru munandi meiri samdir um ymisk viðurskifti nú, enn teir vóru fyrr.

Mona Sahlin tók við sum formaður hjá svensku sosialdemokratunum eftir Göran Persson, sum legði frá sær í fjør.